
Statfjord A-boripallurin. Mynd: EPA

# Lægri íløgur í olju ávirkar norska búskapin

**Jógvan Hugo Gardar**

06.09.2014 - 19:27

Oljan.fo

Boðini frá oljuídnaðinum um at teirra íløgur á norska landgrunninum fara at lækka nakað í 2015, ger at ferðin á norska búskapinum bremsar nakað. Tað sama gera metingar sum siga at oljuprísurin lækkar tey næstu tvey-trý árini, skrivar tíðindastovan NTB.

- Keypiorkan hjá norskum húsarhaldum er tó framvegis góð, og tað ger at niðurgongdin ikki verður so sjónlig, segði fíggjargreinarin hjá Nordea Markets, Steinar Juel, tá tey løgdu fram sínar framskrivingar fyri norska búskapin.

Nordea Markets roknar millum annað við at rentan á húsalánum kemur at halda sær lág, og tað kann fáa gongd á meir húsabygging.

Sambært norsku hagstovuni Statens Sentralbyrå (SSB), so gera oljufeløgini íløgur í Noregi fyri einar 227 milliardir norskar krónur í ár. Hetta er nakað minni enn mett varð fyri

trimum mánaðum síðani. Metingin fyri 2015 sigur at oljufeløgini gera íløgur fyri góðar 185 milliardir norskar krónur, og tað er eitt vet meir enn metingin fyri trimum mánaðum síðani.

Minkandi íløguhugur ger at norski landsbankin roknar við at renturnar fara at halda seg lágar í 2015.

Oljufeløgini fara sambært SSB serliga at gera íløgur í verandi ætlanir, og ikki so nógvar íløgur í leiting og í nýggjar brunnar